FJØLRIT - felag fyri føroysk upphavsfólk

# VIÐTØKUR

1. PARTUR: ENDAMÁL OG VIRKI

**§ 1.** Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavarar, tá upphavsrættarliga vard verk verða brúkt eftir reglunum í upphavsrættarlógini.

Stk. 2. Við brúk er at skilja øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er skapt ella er til taks.

Fjølrit hevur sum felagsskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

Stk 3. Virksemi Fjølritar er sum góðkendur avtalufelagsskapur eftir upphavsrættarlógini

1. at gera sáttmálar við brúkarar um viðurlag fyri brúk av teimum sløgum av verkum, sum limir limafelaganna skapa
2. at krevja inn, umsita og býta út viðurløg fyri brúk av nevndu verkum
3. at fáa til vegar upplýsingar til at styrkja grundarlagið undir viðurlagskrøvum mest møguligt
4. at veita feløgum hjá útlendskum rættindahavarum viðurløg fyri brúk av teirra verkum í Føroyum, og frá hesum at taka ímóti viðurløgum fyri brúk av føroyskum verkum uttanlands
5. støðugt at upplýsa brúkarar og rættindahavarar um møguleikar og rættindi teirra

2. PARTUR: LIMASKAPUR

**§ 2.** Feløg, sum umboða ein munandi part av upphavsmonnum til tey verk ella tey sløg av verkum, sum verða brúkt í Føroyum, kunnu fáa limaskap i Fjølrit. Umboðsráðið tekur avgerð.

Stk. 2. Limafelag skal kunna vísa á, at limir tess hava givið felagnum fulltrú til at røkja og umsita teirra rættindi, og loyvi til at avhenda hesa fulltrú víðari til tann upphavsrættindafelagsskap, sum av landsstýrismanni hevur fingið loyvi at virka sambært § 40, stk. 1 í Løgtingslóg um Upphavsrætt.

Upphavsmaður kann, sambært Lóg um upphavsrætt, §42, seta bann fyri, at nakar av avtalupørtunum kann brúka verk hansara.

Stk 3. Limaskapur kann sigast upp við minst seks mánaða freist til at fara úr gildi 1. januar árið eftir. Limafelag, sum hevur sagt limaskapin upp, er ikki bundið av sáttmálum, sum Fjølrit ger i uppsagnartíðini.

Stk. 4. Limir í Fjølrit kunnu verða útihýstir, um teir ikki longur uppfylla treytirnar sambært §2, stk. 1 í hesum viðtøkum.

3 . PARTUR: SKIPAN

**§ 3.** Umboðsráðið og stjórnin stýra Fjølriti.

UMBOÐSRÁÐIÐ:
Stk. 2. Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð i umboðsráðið. Hvørt tilnevnda umboð hevur eina atkvøðu. Varaumboð hava rætt til at vera á fundi, taka orðið og koma við uppskotum.

Limafeløgini boða Fjølriti skrivliga frá, hvør er tilnevndur. Tilnevningin er galdandi, til hon skrivliga verður afturkallað.

Umboð hjá einum limafelag kann við skrivligari fulltrú umboða annað limafelag.

Stk. 3. Umboðsráðið skal:
1. gera av, hvussu Fjølrit skal virka eftir 1. parti
2. velja stjórnina
3. hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
4. eftir uppskoti frá stjórnini gera reglugerð um handfaring av viðurløgum, herundir fyri nýtslu av viðurløgum, sum ikki kunnu býtast út

Umboðsráðið kann eisini átaka sær aðrar generellar og konkretar uppgávur ella seta arbeiðsbólkar til slíkt .

Stk. 4. Umboðsráðið er viðtøkuført, tá 3/4 av limunum eru á fundi. Samtyktir í umboðsráðnum verða tiknar við vanligum meirluta.

Stjórnin, grannskoðarin ella í minsta lagi tvey limafeløg kunnu krevja umboðsráðið kallað saman.

Umboðsráðið verður kallað saman skrivliga við minst 14 daga freist. Í fundarboðunum verður tilskilað, hvørji mál skulu viðgerast. Limafeløgini eiga at fáa skrivlig boð i seinasta lagi eina viku, áðrenn freistin at senda inn uppskot er úti.

Stk. 5. Umboðsráðið hevur fund minst eina ferð um árið. Hesin fundur skal vera fyri 28.februar og er aðalfundur Fjølritar.

Skráin fyri aðalfundin er henda:

1. Fundarstjóri verður valdur.
2. Fundarbókin frá síðsta aðalfundi og møguligum øðrum fundum í árinum verður lisin upp.
3. Ársfrágreiðing frá stjórnini, herundir
    a. Hvørjar avtalur eru galdandi
    b. Hvussu nógv er kravt og goldið í viðurløgum
    c. Hvussu nógv er brúkt til umsitingarkostnað
    d. Hvussu viðurløg, sum ikki kunnu býtast út, eru brúkt, og hvør hevur fingið burturav
4. Grannskoðaður roknskapur til góðkenningar.

5. Uppskot frá stjórnini um fíggjarætlan fyri komandi ár til góðkenningar.
6. Møgulig onnur mál, sum eru nevnd í fundarboðunum.
7. Val
    a. Val av formanni og næstformanni í umboðsráðið.
    b. Val av formanni, næstformanni og einum limi i stjórnina og varalimum fyri teir.
    c. Val av grannskoðara.
8. Ymiskt.

Uppskot um mál at viðgera á aðalfundinum skulu stjórnini í hendi i seinasta lagi tríggjar vikur fyri fundin.

Stk. 6. Formaðurin i umboðsráðnum er fundarstjóri. Fundurin kann tó velja annan persón, um semja er um tað. Fundarstjórin syrgir fyri, at fundurin verður førdur í fundarbókina.

STJÓRNIN:
Stk. 7. Í stjórnini eru formaður, næstformaður og ein triði limur. Hvør stjórnarlimur hevur sín varalim. Stjórnarlimir kunnu ikki eisini vera i umboðsráðnum

Stk. 8. Stjórnin útinnir dagliga virkið hjá Fjølriti. Stjórnarformaðurin einsamallur ella tveir stjórnarlimir saman tekna Fjølrit. Ein stjórnarlimur kann krevja, at stjórnin verður kallað saman.

Stk. 9. Hvør stjórnarlimur hevur eina atkvøðu. Stjórnin er viðtøkufør, tá ið tveir limir eru hjástaddir, teirra millum antin formaðurin ella næstformaðurin. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stjórnin førir fundarbók.

Avgerðarfrásagnir vera sendar umboðsráðnum so hvørt.

Stk. 10. Stjórnin kann seta skrivara og onnur í starv at taka sær av dagligu umsitingini, eftir starvslýsing og setanartreytum, sum umboðsráðið frammanundan hevur góðkent.

Stk. 11. Stjórnin ger av, hvørja fulltrú skrivari og umsiting skulu hava.

4. PARTUR: UMSITING, BÝTI OG AVSETING

**§ 4.** Brúkarin setir viðurløg, sambært avtalu, beinleiðis inn á konto hjá Fjølriti. Tá umsitingarkostnaður er goldin burturav, býtir stjórnin restina út til hvønn einstakan rættindahavara, og setur av upphæddir til útlendsk rættindahavarafeløg , sum avtalur eru gjørdar við.

Útgjalding fer fram skjótast tilber eftir reglugerð um handfaring av viðurløgum.

Rættindahavarar kunnu skráseta seg á heimasíðuni hjá Fjølrit, fyri at tryggja, at útgjaldið fer til røttu bankakonto. Skrásetingin fer fram sambært løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum.

Stk 2. Viðurløg, sum ikki kunnu býtast út, verða brúkt eftir reglunum um slík í reglugerð um handfaring av viðurløgum, samtykt av umboðsráðnum og lýst alment á heimasíðu felagsins.

5. PARTUR: ROKNSKAPUR

**§ 5.** Grannskoðaður ársroknskapur verður, aftaná góðkenning í umboðsráðnum, sendur landsstýrismanninum í Mentamálum, sambært § 40, stk. 3, pkt. 4 í Løgtingslóg um upphavsrætt, og hereftir lagdur út á heimasíðuna hjá Fjølrit, atkomuligur fyri almenninginum.

6. PARTUR: ÓSEMJUR

**§ 6.** Partar í Fjølrit eru limafeløgini. Allar ósemjur millum partarnar ella ósemjur millum partar øðrumegin og Fjølrit hinumegin, sum ikki kunnu loysast á annan hátt, vera at leggja fyri Føroya rætt sum vanlig sakarmál

7. PARTUR: VIÐTØKUBROYTING OG AVTØKA

**§ 7.** Umboðsráðið kann gera broytingar í hesum viðtøkum ella taka Fjølrit av, tá 3/4 av øllum umboðunum hjá limafeløgunum atkvøða fyri.

Stk. 2 Verður Fjølrit tikið av, skal avtakandi aðalfundurin gera av, hvussu ognir Fjølritar skulu brúkast til frama fyri rættindahavarar.

*Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi 8 .apríl 1992*
*Broyttar á aðalfundi 28. mai 2014*
*Broyttar á aðalfundi 16. januar 2018*
*Broyttar á aðalfundi 30. januar 2019*
*Broyttar á aðalfundi 18. februar 2026*